# Kjak



Thomas Arabo

## Atlantsflog aftur á breddan – hví?

Uppgávan hjá politikarum er at skapa góðar og tryggar fyritreytir fyri sínum borgarum, bæði tá tað snýr seg um at liva og virka. Heilt sjálvsagt er tað fyri øllum, at politiska skipanin má hava ræðisrætt á heilsuverki og almannaverki, so teir veikaru bólkarnir í samfelagnum hava tryggar karmar.

Koma vit so til tað virkna fólkið, so hava hesi sanniliga eisini fyri neyðuni at hava tryggar karmar at virka innan fyri. Her koma vit so til aðrar strukturar, sum til dømis el kervið, FT-net, vegir og síðst men ikki minst sjálva flutningskipanina.

Soleiðis sum vit liggja fyri landafrøðiliga, og soleiðis sum vinnustrukturin er blivin, har hundraðtals fólk hava síni arbeiðspláss uttanlands og eru búsett í Føroyum, so er tað av avgerandi týdningi, at vit hava føroyskan ræðisrætt á flogferðsluni við umheimin.

At Fólkaflokkurin vil privatisera er einki nýtt. Ofta hevur tað sæð út sum at ein av hansara høvuðsuppgávum at lata virðir úr landskassanum til nøkur fá fólk at umsita - ikki altíð vanliga fólkinum at gagni.

Nú ljóðar, at løgtingið fær tvey upskot um Atlantsflog. Annað sigst vera at selja restina av felagnum. Dugi ikki at hugsa mær, at hettar hevur nakran møguleika – serliga aftan á at føroyingar upplivdu øskuvikuna, tí hvussu hevði gingið, um ræðisrætturin var á útlendskum hondum?

Hitt upskotið sigst verða at keypa partabrøvini í felagnum aftur fyri sama prís, sum tey blivu seld fyri. Tað má sigast at vera ein merkiligur tanki, at kurssikra partabrøv við afturvirkandi kraft.

Í mínum oyrum virkar hettar púra korrupt. Nei, íleggjarnir hava gjørt sínar íløgur á ov veikum grundarlagi og mugu tolnir bíða eftir vinningsbýti, tá tað einaferð kemur, á sama hátt sum allir aðrir íleggjarir.

Nei, latið nú Atlantsflog hava frið. Tey sum hava virkað í og fyri felagnum, síðan tað bleiv stovnað, hava klárað tað fyrimyndarliga væl, okkum øllum at stórum gagni.

Tað eru vit nógv sum eru ógvuliga taksom fyri.



Dávid Isfeld
*Hósvík*

## Sum at spjaða seyðaflokk

**Samt løgting…**
Allir flokkar á tingi vóru samdir um at viðgerða stjór narskipanaruppskotið, sum tað var. Men so komu danskir embætismenn upp í leikin og nevndu orðini "begyndelse på løsrivelse", og so fór tingið í tvinnar leirar – sum vanligt – líka so skjótt sum tú spjaðir eina torvu av ternumurtum við einum steinkasti.

Hetta er so skuffandi altíð at vera vitni til. Hvar er viljin til egnan rætt? Hví er okkara fótafesti so veikt og okkara stev so trek? At vit hava verið víkingar her á landi; at vit hava verið sjómenn, ið sigldu millum týskar kavbátar undir 2. heimsbardaga, sæst ikki aftur í stórum parti av hesi tingmanning, tí har sæst hvørki dirvi ella árræði, til at gera tað, ið gerast skal. Tað er ikki í lagi, at dirvi fánar og hvørvur, bara tí at danir siga nøkur orð ímóti okkara ætlan. Hóast tingarbeiði er skrivstovu- og fundararbeiði, eiga tingfólk at hava dirvi og støðufesti; og ikki hokna av einum loti úr landsynningi.

Tað er so lætt at spjaða seyðaflokkin á tingi í Føroyum, at tað ikki eingang er nøkur avbjóðing fyri donsk embætisfólk; bert nøkur fá neilig orð, og so byrjar tvídeilingin og klandurin. Donsku embætisfólkini kunnu nú lena seg afturá og síggja leikin í løgtinginum fáa egið lív; meira nýtist ikki at verða gjørt, tí klandurin og kjakið er farið í sjálvsving – óivað flenna tey og tosa við soltnari virðing á Christiansborg um seyðirnar í seyðahami á Føroya Løgtingi.

### Stýrisskipanarbroytingar

Stýrisskipanarbroytingar bera bert til, um tað gamla verður skúgva til viks. Tá "Magna Carta" varð skrivað í 1215 í London, var hetta gjørt eftir trýsti frá aðalsmonnunum í Englandi. Hetta var ikki sambært lógini hjá kongi, at aðalsmenn kundi trýsta kong at geva teimum størri frælsi og vald. Allar stýrisskipanarbroytingar gera upp við undanfarnu stýrisskipanir, og kunnu, millum hjálandaveldi og hjáland, í síni náttúru ikki vera í samsvar við undanfarnu stýrisskipanum.

Ironiskt sum tað er, so eru ymisk punkt í okkara heimastýrislóg eisini beinleiðis í stríð við donsku grundlógina. Nevnast kunnu tvey sera týðandi punkt: lóggeving og skattaáseting. Sambært donsku grundlógini eiga vit í Føroyum ikki at hava heimild til hetta, men tað hava vit altso. At arbeiða og lóggeva í stríð við grundlógina, hav danir sjálvir umfatandi royndir við, so vit kunnu bara staðfesta, at tað als ikki er tað stóra "lógar-halgibrot", sum onkrir danskir og eisini føroyskir løgfrøðingar vilja vera við. Forfardu rópini um lógarbrot og stríð við grundlóg kunnu tagna nú, og latið tingfólkið so ístaðin fari í gongd við at viðgerða stýrisskipanaruppskotið.

### Hvat vilja vit?! - ikki: hvat sleppa vit?

Hvussu ofta hava vit ikki hoyrt donsku orðingina "kræv din ret" í einum ella øðrum práti ella kjaki? Hatta er donsk mentan, ið vit kundu lært nakað av. Vit skulu spyrja okkum sjálv, hvat vit vilja ríkisrættarliga, og síðani arbeiða fram ímóti tí, uttan fyrilit fyri nøkrum øðrum landi. Hetta hava vit heimild til, tí vit eru ein egin tjóð við egnum serstøkun uppruna, søgu og siðvenju. Vit eru ikki danir, ið búleikast á nøkrum oyggjum í útnorði; so hevði støðan verið ein onnur, men tað er hon ikki. Sum áður sagt: vit mugu fyrihalda okkum til veruleikan – okkara veruleika, ikki ein av fremmandum monnum ódemokratiskt konstrueraðan veruleika.



Bjørt Samuelsen
*løgtingskvinna*

## Prinsippir um útbjóðing av frímerkjum og tunlum

Innlendismálaráðið hevur givið Klaksvíkar kommuna eina harðliga átalu fyri at selja Føroya Keypssamtøku grundstykki uttan alment útboð. Sig so ikki, at landsins myndugleikar ikki krevja, at prinsippir og reglur skulu haldast!

Krøv um almenna útbjóðing eru sett fyri at javnseta allar borgarar og allar vinnufyritøkur, fyri at almenni myndugleikin best umsitur tey virði, landið, tað er borgararnir, eiga. Og fyri at forða fyri, at politikarar kunna fjálga um summi framum onnur, eftir egnum huga.

Tað er sjálvandi ein smálutur, at ein lítil undirsjóvartunnil millum Streymoynna og Eysturoynna ikki verður boðin út. Her hevur Innlendismálaráðið givið einum privatum felagi lógarfestan einkarrætt. Og enntá áðrenn nakar heilt veit, hvørjir endaligu eigararnir vera, tí figgjarviðurskiftini vóru ikki komin uppá pláss, tá einkarrættarlógin varð undirskrivað.

Men, her er jú bert talan um størstu útbygging í Føroya søgu, og eina íløgu fyri omanfyri eina milliard. Tað setur líkasum freku gerðina hjá Klaksvíkar kommunu í rætta perspektivið. Og so kunnu øll síggja, hvussu hetta landið verður stjórnað eftir prinsippføstum reglum!